| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 27. september 2007 |
| Býráðsfundur nr. | 11/2007 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2007 tann 27. september kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 20. september 2007 um innkalling til fundar.

**<u>Møtt vórðu:</u>**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Signar á Brúnni
Gordon M. Petersen
Tórfríður Abrahamsen
Petur Abrahamsen

Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Eyðun á Lakjuni, sum sambært skriv, dagfest 19. september 2007 boðar frá, at hann verður burturstaddur uttanlanda, og at hann ynskir, at varalimurin á lista A tekur sæti sína vegna.

Jón Nolsøe Olsen boðar frá í telduposti til borgarstjóran, dagfestur 25. september 2007, at hann ikki møtir á býráðsfundinum av persónligum ávum.

Við á fundinum luttók eisini Marin Sólheim Thomsen, fíggjarleiðari undir viðgerðini av máli nr. 60, 61 og 62.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**<u>Mál nr. 60/2007.</u>**

**Mál viðv. 1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2008.**

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 18. september 2007 til fyribils fíggjarætlan fyri kommununa fyri ár 2008.

Vísandi til grein 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 1. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Hjálagda uppskot, sum fíggjarnevndin hevur viðgjørt á fundi tann 19. september 2007 og gjørt broytingar til í mun til sjálvt uppskotið frá fyrisitingini, javnvigar við kr. 81.853.984,00, og verður roknað við einum avlopi upp á kr. 160.417,00.

Rakstrarútreiðslurnar netto til kr. 27.583.406,00, rentuútreiðslurnar netto til kr. 1.800.000,00 og avdráttirnir av føstum lánum til kr. 6.500.000,00 og íløgurnar brutto til kr. 27.566.152,00 og netto til kr. 21.466.152,00.

Avseting til bygging av Røktarheimi, sum sambært býráðssamtykt eigur at verða kr. 2.900.000,00 er lækkað niður í kr. 0,00 í 2008, sum er sama upphædd sum í 2007 og 2006. Eftir hesi avsetingingum eigur kommunan umleið kr. 8,0 mió. á bók pr. 31. desember 2007 til nevndu bygging. Av tí at spurningurin um 50% studning frá tí almenna, hetta sambært lóg um bygging av ellis- og røktarheimum, so eigur hetta mál at verða tikið upp aftur við landsstýrismannin í Almanna- og heilsumálum skjótast.

Annars hevur kommunan fingið skriv frá landsstýrismanninum, har sagt verður frá, at kommunan onga stuðulsjáttan fær í hesum umfari, so ein Røktarheimsbygging møguliga verður seinkað 4-5 ár í mun til ta ætlan, sum býráðið samtykti 26. november 2002.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 42.009.976,00 við skattaprosenti 21,5%, meðan partafelagsskatturin verður mettur til kr. 5.000.000,00. Nýtslan av innistandandi verður kr. 2,0 mió og mett lántøka kr. 8,5 mió.

Avseting til bygging av Røktarheimi av innistandandi verður kr. 0,00. Higartil hevur eitt kommunuskattaprosent verið nýtt til avsetingina til røktarheimsbygging + nýtsla av innistandandi,

men verður neyðugt, um avsetingin skal verða tann sama sum í 2005, sum samtykt er gjørd um, so verður neyðugt við lántøku ella við eykanýtslu av innistandandi.

Um so verður, at avseting aftur verður gjørd í 2008 til Røktarheimsbyggingina, so verður neyðugt sambært býráðssamtykt, sum er galdandi at hækka kommunuskattaprosentið við 1,0%, um raksturin og íløgurnar skulu haldast á tí støði, sum skotið verður upp í uppskotinum til 1. viðgerð.

Fíggjarnevndin samtykti á fundi tann 19. september 2007 at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2008 fyri býráðið til 1. viðgerð. Henda ætlan verður at skilja sum fíggjarligur karmur fyri rakstri, íroknað íløgum av kommununi fyri 2008, og verður málið eftir viðgerð á býráðsfundinum 27. september 2007 sent út til føstu stóru kommunalu nevndinrnar til víðari viðgerðar fyri síðan at leggja ætlanina aftur fyri býráðið til 2. viðgerð á almenna býráðsfundinum, sum sambært lýsingini verður hildin hósdagin tann 25. oktober 2007.

**Avgerð:**

Samtykt varð at beina fíggjarætlanina aftur í fíggjarnevndina til víðari viðgerðar, fyri síðan at leggja uppskot fyri býráðið til 2. viðgerð. (8-0).

**<u>Mál nr. 61/2007.</u>**

***Viðvíkjandi eykajáttan til viðlíkahald og rakstur av skúlanum konto 400104-400199.***

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá kommunalu umsitingini, dagfest 18. september 2007, hvar greitt verður frá, at neyðugt at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan í sambandi við "Blokk 1 skúlin", sum umfatar el-,olju-, tryggingar-, innbúgv- og viðlíkahaldsútreiðslur, harímillum ísetan av nýggjum vindeygum.

Blokkurin svarar tíverri ikki til nýtsluna í ár, eitt nú grundað á at meira verður brúkt til vindeygu, innbúgv, viðlíkahald enn avsett er á fíggjarætlanini fyri 2007.

Avsettar eru kr. 950.000,00 til blokkin, men verður roknað við at nýta kr. 400.000,00 aftrat í ár til hesar meirútreiðslur.

Skotið verður upp, at fíggingin verður útvegað av konto 445010 "Útbygging og projektering av skúlanum", har kr. 2,1 mió eru avsettar og lítið og einki brúkt higartil í ár.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. september 2007, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 400.000,00 til omanfyri nevndu endamál, og at henda verður fíggjað av konto 445010 "Útbygging og projektering av skúlanum".

Nevnda eykajáttan ber ikki eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan, tá ið talan í hesum føri verður um eina umflyting av játtan undir øki 4 "Skúla- og mentamál".

**Avgerð:**

Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi, sum verður 25. oktober 2007. (8-0).

**<u>Mál nr. 62/2007.</u>**

***Viðvíkjandi eykajáttan til rakstur av brunaverkinum konto 230000-239995.***

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá kommunalu umsitingini, dagfest 18. september 2007, hvar greitt verður frá, at neyðugt at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan til rakstur av brunaverkinum, grundað á at avsetingin ikki svarar til nýtsluna higartil í át, m.a. at meira verður brúkt á konto "Skeiðsvirkseim 230072", "Amboð brandstøðin 230040" og konto !"Brunastjóraløn 230050".

Til skeiðvirksemi eru avsettar kr. 20.000,00 og higartil í ár eru nýttar kr. 110.000,00, hetaa grundað á, at nógv nýggj brunafólk eru sett í starv í ár fyri fólk, sum av eini ella aðrari orsøk eru farin úr starvi. Til skeiðvirksemi er brúk fyri eini eykajattan upp á kr. 140.000,00 til konto 230072.

Ein tangabilur er útvegaður og nýggir hjálmar við headsett eru keyptir til brunaliðið, soleiðis at kr. 30.000,00 vænta á konto 230040 "Amboð". Talan verður sostatt um eina eykajáttan upp á kr. 30.000,00.

Starvið sum brunaleiðari er normerað soleiðis, at konto "Brunastjóraløn 230050" upp á kr. 110.000,00 er kr. 30.000,00 ov lág, og tí má ein eykajáttan upp á nevndu upphædd neyðug.

Talan er sostatt um eina samlaða eykajáttan av brunaverkinum í bólki 2 upp á tilsamans kr. 200.000,00 í 2007.

Skotið verður upp, at eykajáttanin verður fingin til vega av meirskattainntøku A+B fyri 2007.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. september 2007, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 200.000,00 til omanfyri nevndu endamál, og at henda verður fíggjað av konto 860005.

Nevnda eykajáttan kemur at bera eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan upp á kr. 200.000,00, og kemur sostatt at ávirka rakstrarúrslitið fyri 2007 við nevndu upphædd.

**Avgerð:**

Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 25. oktober 2007. (8-0).

**Mál nr. 63/2007.**

***Mál viðvíkjandi frítíðarundirvísingini veturin 2007-2008.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Fuglafjarðar skúla, dagfest 22. august 2007 saman við uppskoti til frítíðarundirvísing veturin 2007-2008, og hvar heitt verður á kommununa vegna skúlan um at søkja Mentamálaráðið um at fáa játtaðan stuðul svarandi til hjáløgdu meting, sum í peningi er kr. 297.000,00.

Hetta svarar til eitt undirvísingartímatal upp á 2.200 tímar. Veturin 2003-2004 brúkti skúlin umleið 1.300 tímar, meðan skúlin hevur nýtt 1.580 tímar veturin 2004-2005, veturin 2005-2006 1600 tímar og veturin 2006-2007 1.500 tímar.

Somuleiðis søkir skúlin um heimildir sjálvur at taka støðu til onnur tilboð, um so verður, at okkurt av tilboðunum fella burtur, t.d. av ov lítlari undirtøku. Eisini verður biðið um at fáa heimild at laga tímatalið til lærugreinarnar, um so verður, at fullur stuðul ikki verður veittur av Mentamálaráðnum.

Mælt verður eisini til, at luttøkugjaldið verður kr. 200,00, um skeiðið er styttri enn 40 tímar og kr. 400,00 um skeiðið er longri enn 40 tímar..

Eisini verður mælt til, at kommunan avsetir kr. 40.000,00 á konto 410020 til at nýta til ferðagjøld til lærarar, kunngerðir og møguliga útgerð. Ætlanin er at keypa 10 stólar til seymiskeiðini í Riberhús fyri kr. 5.000,00. Vónin hjá leiðsluni fyri frítíðarundirvísingina er, at játtanin 410020 verður hækkað úr kr. 25.000,00 upp í kr. 40.000,00.

Kvøldskúlin hugsar sær at lýsa við nevndu tilboðum um miðjan september 2007.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini 10. september 2007, og mælir nevndin mælir býráðnum til at góðkenna uppskotið frá Fuglafjarðar kvøldskúla til frítíðarundirvísing veturin 2007-2008, og at býráðið søkir Mentamálastýrið um stuðul upp á kr. 297.000,00 svarandi til 2.200 undirvísingartímar. (Almenn frítíðarundirvísing 1.720 tímar + frítíðarvirksemi 480 tímar).

Kommunan rindar 50% av lønunum til lærarar í sambandi við vanliga frítíðarundirvísing, meðan Mentamálaráðið rindar hina helvtina. Ráðið rindar allar lønir til serstaka frítíðarundirvísing mett 210 undirvísingartímar.

Eisini verður mælt til, at skúlin fær heimild til at tillaga tímatalið til lærugreinarnar, um so verður, at fullur stuðul ikki verður veittur, og at skúlin somuleiðis fær heimild til sjálvur at taka støðu til onnur tilboð, um okkurt av tilboðunum av ymiskum orsøkum falla burtur.

Mælt verður býráðnum til, at luttøkugjaldið verður sum skotið verður upp kr. 200,00 fyri skeið styttri enn 40 tímar og kr. 400,00 fyri skeið longri enn 40 tímar galdandi frá 01. september 2007 at rokna.

Á fíggjarætlan kommununar fyri 2006 eru avsettar kr. 25.000,00 á konto 410020 "Kvøldskúlin aðara útreiðslur", og nýttar eru kr. 4.439,82 pr. 31. august 2007 . Nevndin er sinnað til at heita á fíggjarnevndina um at avseta kr. 40.000,00 á fíggjarætlan kommununar fyri 2008.

Nevndin mælir somuleiðis býráðnum til at heita á leiðsluna fyri Fuglafjarðar kvøldskúla um at gera sítt til, at lýst verður við skeiði í "Urtagarðsrøkt vm." , grundað á vit í kommununi hava fleiri gartnarar við útbúgving, og at hetta skeið kundi verið ein hjálp og vegleiðing hjá fólki, sum hava ella koma at fáa sær urtagarðar í býnum.

**Avgerð:**

Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (8-0).

**<u>Mál nr. 64/2007.</u>**

***Vinarbýarsamband við Norðurhping kommunu (Húsavík) í Íslandi.***

Fuglafjarðar kommuna hevur síðani 23. august 2005 umrøtt spurningin um nýggjan vinarbý í Íslandi í staðin fyri Selfoss, sum hevur verið óformellur vinarbýur við Fuglafjørð síðan 1973. Kommunan hevur fleiri ferðir roynt at fingið formligt vinarbýarsamband við Selfoss, tó uttan úrslit. Seinasta royndin varð gjørd av Hallbjørg Hansen, fyrrverandi borgarstjóra í 1999.

Tá ið Húsavík eisini er vinarbýur við Aalborg, so hevur fleiri ferðir verið tosað við umboð fyri bæjarstjórnina í Húsavík um hesi viðurskifti. Umboð fyri kommununa vóru á vitjan í Húsavík mánaðarskifti juni/juli 2006, og vórðu umboðini sera væl nøgd við vitjanina, somuleiðis sum staðfest er, at Norðurphing kommuna (fyrrverandi Húsavíkar kommuna) er sera lík okkara á mongum økjum.

Nevndin er av teirri meting, at rættast er, um kommunan skal hava nýggjan formellan vinarbý í Íslandi, at hesein eisini er í vinarbýarsamstarvi við Aalborg. Undir ungdómsleikunum í Aalborg í august 2007 varð aftur tosað við umboð fyri Norðurphing kommunu, og varð skotið upp, at umboð fyri íslendsku kommununa komu til Fuglafjarðar fyri at skriva undir vinarbýaravtalu kommunurnar millum seinast í september.

Í hesum sambandi verður víst til skrivligt samskifti partanna millum, sum lagt verður hjálagt málinum.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 10. september 2007, og mælir nevndin einmælt býráðnum til, at formligur vinarbýarsáttmáli verður gjørdur við Norðurphing kommunu (Húsavík), og at kommunan boðar Árborgar kommunu frá, at óformella vinarbýarsambandið við Selfoss verður sett úr gildi tann 01. oktober 2007.

Somuleiðis verður miðað fram ímóti, at vinarbýaravtalan við Norðurphing verður undirskrivað í viku 41/2007, t.v.s. aðru viku í oktober 2007. Fyrisitingin kemur at leggja henda spurning fyri íslendsku kommununa.

**Avgerð:**

Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (8-0).

**<u>Mál nr. 65/2007.</u>**

**Viðvíkjandi uppskoti til broytan av viðtøkunum fyri foreldraráð.**

Fuglafjarðar býráð hevur móttikið tilmæli frá sosialu nevndini frá 19. september 2007 hvar heitt verður á ráðið um at fremja broyting í viðtøkunum fyri foreldraráð á kommunalum ansingarstovnum. Talan er um broytan av § 7 í galdandi viðtøkum, soleiðis at greinin framyvir verður broytt til: " tá minst ein triðjingur av barnatalinum er umboðað.

Í galdandi viðtøkum stendur "minst helvtin av barnatalinum er umboðað". Tá ið staðfest er, at í ávísum skipanum er truðult at fáa helvtina av barnatalinum umboðað á foreldrafundi, tá ið val er á skránni, verður mett rættast, at henda grein verður broytt samsvarandi uppskotinum. Kommunan hevur fingið løgfrøðislig at vita, at einki er til hindurs fyri broytingini í galdandi lógum á økinum.

**Avgerð:**

Tilmæli frá soslalu nevndini varð samtykt. (8-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.50.

Jann Toftegaard

Dánjal vang

Elisabeth D. Eldevig

Signar á Brúnni

Gordon M. Petersen

Petur Abrahamsen

Tórfríður Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen